tíðindablaðið
sosialurin
Internet: www.sosialurin.fo

Ábyrgdarblaðstjóri: Jan Müller
Blaðstjóri: Eirikur Lindenskov

Marknaðardeild: Jonhard Hammer, Dagbjørt S. Hansen
Blaðfólk: Áki Bertholdsen, Turið Kjølbro, Dánjal Højgaard

Dagfinn Olsen, John Johannessen, Sveinur Tróndarson, Eyðun Klakstein, Høgni Mohr
Ítróttur: Jákup Mørk

Myndamenn: Jens Kristian Vang, Ólvur Haraldsen
Útgevari, uppseting: Sp/f Sosialurin
Bústaður: Argjavegur 26, Argir

Postadr: Postsmoga 76, 110 Tórshavn
Telefon: 311820
Telefax. 314720
e-mail: post@sosialurin.fo
Lýsingar: lysing@sosialurin.fo
Prent: Sosialurin

At rætta bakara fyri smið

Oddagrein

Politisku hendingarnar seinastu dagarnar eru eitt talandi prógv um, at hvørki politikkarar ella stovnsleiðarar - leik og lærd - kenna til fulnar ta nýggju stýrisskipanarlógina. Somuleiðis tykist greitt, at bæði politikkarar og almenningurin hava ov lítlan kunnleika til skipanirnar við fíggjarlóg, eykafíggjarlóg, eykajáttarlóg og játtanarskipanunum.

Hetta er ein niðurstøða eftir málið við Signari á Brúnni og Sjónvarpi Føroya, sum landsstýrismaðurin útvegaði pening úr gjaldsføri landskassans, tá hesin stovnur hevði rent seg fastan fíggjarliga, og eftir at fíggjarnevndin bað hann fara í løgtingið við málinum.

Nú verður kastað eftir fjølmiðlum fyri, at teir hava gjørt sítt til, at ein landsstýrismaður varð loystur úr starvi. Men tað eru ikki fjølmiðlarnir, sum hava veitt einum stovni pening úr landskassanum. Teir hava umrøtt og viðgjørt eina heilt greiða niðurstøðu hjá løgtingsgrannskoðarunum.

Tjóðveldisflokkurin tók málið upp síðsta hóskvøld, og viðgjørdi tað fríggjadag, leygardag og mánadag, og sjálvandi fylgja fjølmiðlarnir við gongdini dag frá degi, ella frá tíma til tíma. Tá flokkurin hjá landsstýrismanninum tekur málið upp, má tað vera tí, at hann heldur málið hava stóran týdning.

Avleiðingarnar kenna vit. Men nú er eisini staðfest, at Signar á Brúnni helst ikki kendi stýrisskipnarlógina, tá hann bað um at vera loystur úr starvi. Somuleiðis er eisini staðfest, at Tjóðveldisflokkurin - og kanska landsstýrið eisini - neyvan kendi stýrisskipanarlógina, tá møguleikarnir fyri eini óheftari kanning vórðu umrøddir lagnudagarnar hjá Signari á Brúnni - mánadagin og týsdagin.

Somuleiðis verður kastað efir fjølmiðlunum, hví teir bara hava viðgjørt Signar á Brúnni, og hví teir ikki hava viðgjørt Strandferðsluna og Landsverkfrøðingin og Finnboga Arge, Almannastovuna og Helenu Dam á Neystabø og aðrar landsstýrismenn við. Men í hesum dømum er støðan ein heilt onnur, og í summum førum hava løgtingsgrannskoðararnir átalað framferðina. Okkurt kundi verið gjørt betri, men at lasta fjølmiðlunum fyri at Signar á Brúnni varð loystur úr starvi, er at rætta bakara fyri smið

So er spurningurin, um Tjóðveldisflokkurin ikki kyndi uppundir við tí nógva fundarvirkseminum, og um ikki Signar á Brúnni sá skriftina á vegginum. Í øllum førum tóktist greitt týsdagin, at misálit fór at verða reist ímóti honum. Og tá samgongumenn vóru við í ætlanini, hevði mísálitsuppskotið helst verið samtykt. Harafturat er spurningurin, um partar í Tjóðveldisflokkinum ikki vóru komnir til ta niðurstøðu, at Signar á Brúnni vóð upp um miðju í óloystum málum og tískil skaddi umdømi floksins, og tí hildu, at best var at fáa hann frá?

Sosialurin

Viðmerking:

Viðmerking til Krosskast

Eftir at hava sæð seinasta Krosskast, hava fólk helst fingið ta fatan, at eingin løgtingslimur hevur varnast, at trupulleiki fór at vísa seg í fólkaskúlanum. Og so slettis ikki limir í Mentanarnevndini. Teir hava einki varnast. So er ikki.

Tvær orsøkir eru til tað.·

- At sjónvarpsmaðurin ikki tykist kenna mannagongdina, tá fíggjarlógaruppskot er í nevnd (ella legði hann sær ikki orðini nóg hegnisliga í munnin? Kanska vildi hann erta eitt lítið sindur? Tað ger einki!).

- at formaðurin í Mentanarnevndini, Jógvan á Lakjuni, av góðum grundum ikki var við í nevndarviðgerðini av millum annað fólkaskúlanum, eftir sum hann tá var staddur í New York umboðandi sín flokk.

Mannagongd

Mannagongdin er tann, at Fíggjarnevndin vísir teim pørtum í fíggjarlógaruppskotinum, sum snúgva seg um málsøki hjá aðrari nevnd, til **ummælis** hjá hesum nevndum (§ 24, stk. 3 í tingskipanini). **Talan er bert um ummælisrætt, og kunnu tær einstøku nevndirnar ikki gera uppskot til broytingar í teim upphældum, sum ásettar eru.** Ummælini verða síðani send Fíggjarnevndini.

Tí er tað púrasta burturvið, tá ið sjónvarpsmaðurin spyr Jógvan á Lakjuni um tað talið, sum er sett av á fíggjarlógaruppskotinum til fólkaskúlan, sum um tað er nakað Mentanarnevndin hevur mælt til.

–Tit munnu hava hildið tað verið nokk, tá ið **tit** ikki hava sett meira av, sigur sjónvarpsmaðurin.

Jógvan á Lakjuni, sum í sendingini umboðaði Mentanarnevndina, svarar, at »landsstýrismaðurin hevur fingið nakrar karmar - hevur fingið teir pengar, hann hevur hildið seg hava brúk fyri, og tað **hevur nevndin tikið undir við**«

Tað er so langt av leið.

Ávaring

Sjálv sat eg í formanssessinum í Mentanarnevndini, meðan Jógvan á Lakjuni var burturstaddur. Vit høvdu nógv at vísa á og spyrja landsstýrismannin um. Størstu málini vóru fólkaskúlin, Sjónvarp Føroya og stuðulin til Ítróttarsamband Føroya.

Viðvíkjandi fólkaskúlanum vísa vit á, at vit væntа ikki at játtanin fer at halda, eisini um sæð verður burtur frá møguligari hækking, sum stava frá samráðingum við Føroya Lærarafelag í mars 2000.

Landsstýrismaðurin sigur okkum at," hóast umbønir og frágreiðingar í samband við økta virksemið á fólkaskúlaøkinum við nýggjari løgtingslóg um fólkaskúlan umframt lønarvøkstur, so fekk landsstýrismaðurin ikki lagað fíggjarkarmin fyri ár 2000 í nóg stóran mun til økta virksemið, sum ætlað í fólkaskúlanum".

Enn minni fær Mentanarnevndin. Okkara uppgáva er sum sagt **at ummæla** og einki annað. Okkara ummæli viðvíkjandi fólkaskúlanum var heilt greitt - tummilin niður!

So vita bæði sjónvarpsmaðurin og mentanarnevndarformaðurin tað.

Sjálvandi kundi Jógvan á Lakjuni roynt at ávirka sína egnu samgongu. Somuleiðis Høgni Hoydal. Men eftir sendingini at dømu, er hvørgin teirra rætti boðberi.

Katrin Dahl Jakobsen,
løgtingskvinna
Javnaðarfloksins

Viðmerking:

Skúlin ongan ministara

Tað er vanligt í øllum demokratiskum stýrum, at samfelagsuppgávurnar verða býttar sundur, har ein ministari fær ábyrgdina av sínum øki.

Høgni Hoydal, landsstýrismaðurin í sjálvstýrismálum, og nú eisini landsstýrismaður í skúlamálum, hevur júst alment úttalað, at hann ikki blandar seg í lønar- og arbeiðsviðurskifti skúlans.

Var tað so neyðugt at seta Høgna Hoydal ístaðin fyri Signar á Brúnni sum landsstýrismann í skúlamálum., tá hesin alíkavæl leggur alt í hendurnar hjá Karsteni Hansen, landsstýrismanni í fíggjarmálum.

Soleiðis prioriterar landsstýrið fólkaskúlan!

Hetta er bert eitt mál av mongum – nevn tú hini!

Eg føli, at politikkararnir spæla »matador« við okkum borgarum.

Petur Sigurd Rasmussen

Tøkk

Hjartaliga takka vit øllum tykkum, sum sýndu samkenslu, tá maður, pápi, verpápi og langabbi okkara

POUL M. JOENSEN
á Trøðni í Fuglafirði

andaðist og varð jarðaður.

Tøkk til heimasjúkrasystrar og til landssjúkrahúsið. Tøkk fyri blómur, kransar og gávur til Thabor.

Tøkk til Niels Jacob, Gordon og Olufson fyri góð og troystarrík orð í kapelli og kirkju. Tøkk til kirkjutænarar og sangarar og tøkk til tykkum, sum hjálptu til í Thabor.

Til seinast vilja vit takka øllum tykkum mongu, sum fylgdu Poul Martin til hansara seinasta hvíldarstað.

Familjunnar vegna

Jóhanna, Arnold, Hilmar, Malena,
Elibert og Erling

Tøkk

Hjartaliga takka vit øllum, sum vístu samkenslu, tá okkara kæra mamma, vermamma, omma og langomma

DAGNY DEBES
Tvøroyri

doyði og varð jarðað.

Tøkk til starvsfólkið á Suðuroyar Ellis- og Røktarheimi, sum so væl vóru um hana til tað seinasta; og til tykkum, sum á ymsan hátt vístu hjálpsemi.

Tøkk til prest, kirkjutænarar, sangarar og berarar. Somuleiðis tøkk fyri blómur og kransar og tøkk til tykkum, sum fylgdu henni til hennara seinasta hvíldarstað.

Fyri tey avvarðandi

Hans Olaf, Harbogi, Dagbjartur og Mina

Høgni Hoydal skal vera formaður

Á flokstinginum hjá tjóðveldisflokkinum í Sørvági er ætlanin at velja ein politiskan formann, sum skal mynda flokkin

Millum tjóðveldisfólk tykist lítil ivi vera um, at tað skal vera Høgni Hoydal sum í framtíðini skal væra formligi oddafiskurin í flokkinum

JÓANNES HANSEN

Eingin ivi skal vera um, hvør tað er, sum er formaður í tjóðveldisflokkinum. Formaðurin skal vera ein teirra, sum umboðar flokkin á løgtingi og í landsstýri, og hann skal samstundis vera boðið hjá flokkinum upp á løgmanssessin.

Tjóðveldisflokkurin fór í gjárkvøldið undir flokstingið í Sørvági, og í dag verður gjørt av, um tað í framtíðini skal vera meiri sjónskt, hvør so at siga skal vera skipari á tjóðveldisskútuni. Millum tjóðveldisfólk tykist lítil ivi vera um, at tað skal vera Høgni Hoydal sum í framtíðini skal vera formligi oddafiskurin í flokkinum.

Høgni Hoydal vil ikki gera viðmerkingar til henda spurningin:

– Eg havi havt so nógv at takast við hesa seinastu tíðina, at eg havi ikki havt stundir til at seta meg inn í uppskotið um nýggjan bygna í flokkinum. Men tað fari eg at gera, áðrenn eg fari vestur til Sørvágs, var tað, sum Høgni Hoydal hevði at siga, tá vit fangaðu hann ímillum tveir fundir.

Bara ein strongur

Óli Holm, formaður í starvsnevndini ætlar, at flokstingið í Sørvági skal verða tað síðsta, har tjóðveldisflokkurin hevur eina tvístreingjaða leiðslu – tað vil siga eina fyrisitingarliga, sum verður vald á flokstinginum og so eina politiska, sum er mannað við fólkavaldu umboðunum.

Óli Holm, sum hevur verið formaður í tjóðveldisflokkinum seinastu sjey árini, fer sjálvur at leggja eitt uppskot fyri flokstingið, sum gongur út uppá, at flokkurin í framtíðini skal hava eina og bara eina politiska leiðslu. Tað vil við øðrum orðum siga, at Óli Holm fer at skjóta upp, at sessurin, sum hann hevur sitið í, skal avtakast.

– Málið er at styrkja leiðsluna í flokkinum. Eingin skal ivast í, hvør tað er, sum myndar tjóðveldisflokkin. Tí skal formaðurin í framtíðini verða valdur millum teirra, sum umboða flokkin í løgtingi og landsstýri, sigur Óli Holm og undirstrikar samstundis, at talan er um eitt uppskot:

– Uppskotið er sent út til limafeløgini, sum harvið eru kunnaði, áðrenn tey koma á flokstingið. Leygardagin verður uppskotið viðgjørt, og um tað verður samtykt, so verður tað á fundinum, at tað verður møguleiki at skjóta upp, hvør skal verða formaður. Eg veit ikki, um tað verða eitt fleiri uppskot til formann.

Umframt formannin skulu sambært uppskotið fimm onnur vera í politisku leiðsluni í tjóðveldisflokkinum. Tvey teirra vera næstformenn. Ein næstformaður verður politiskur næstformaður og ein verður fyrisitingarligur næstformaður. Hesin seinni nevndi næstformaðurin og kassameistarin skulu ikki vera í løgtinginum ella landsstýrinum, men tingmanningin skal eiga ein av teimum seks limunum í politisku leiðsluni.

Um uppskotið verður samtykt, so verður uppskotsstillarin, Óli Holm, ikki í uppskoti til formanssessin. Men vit skilja á fólki innarliga í tjóðveldisflokkinum, at tað er rættuliga sannlíkt, at gamli formaðurin verður fyrsti fyrisitingarligi næstformaðurin. Harafturat verður ein kassameistari í leiðsluni.

Eingin ivi

Høgni Hoydal vil sum sagt ikki gera viðmerkingar til formansvalið. Heldur ikki Óli Holm vil gera viðmerkingar til persónsspurningin. Men tað vil Finnur Helmsdal, sum er ein av teimum, ið kom í løgtingið eftir valið í 1998:

– Eg haldi, at tað er alla æru vert, at Óli Holm og starvsnevndin leggja hetta uppskotið fyri flokstingið. Leiðslan hevur gjørt eitt fyrimyndarligt organisatoriskt arbeiði. Vit í tingbólkinum hava ikki verið uppi í at snikka nýggja uppskotið til, men eg taki undir við Óla Holm og teimum í teirra sjónarmiði, at tað er neyðugt, at í framtíðini skal eingin ivast í, hvør tað er, sum myndar tjóðveldisflokkin.

Og hvør skal tað vera?

– Í mínari verð er eingin ivi. Tað skal vera Høgni Hoydal. Uttan nakað hóvasták er hann eftir stuttari tíð vorðin tann upplagdi politiski leiðarin í flokkinum, og tað hevði ikki verið haldbart, um hann, sum er nátúrligur leiðari, ikki eisini varð valdur til formann, heldur Finnur Helmsdal.

Tá Høgni Hoydal, sum í hesi vikuni fylti 34 ár, gjørdist landsstýrismaður í fullveldismálum, kom Finnur Helmsdal í løgtingið:

– Tjóðveldisflokkurin hevur síðstu tíðina lagt nógva orku í at fáa greitt býti millum uppgávur og ábyrgd. Tað hava vit gjørt á vinnuøkinum og stjórnarliga økinum, og tað er upplagt, at vit eisini heilt konkret plasera uppgávur og ábyrgdir í flokkinum, er sjónarmiðið hjá Finni Helmsdal, sum heldur tað vera sjálvsagt, at leiðsluspurningurin í tingbólkinum framvegis verður upp til tingmanningina sjálva at avgera.

Internetið letur dyrnar upp

Internethandil, webstores ella netshops, óansað navnið er handil á heimasíðuni eitt gott boð uppá framtíðar atgongd til útflutningsmarknaðin, skrivar Vinnuhúsið.

Handil gjøgnum internetið vindur uppá seg bæði á heimamarknaðinum og uttanlands. Nethandil styrkir møguleikarnar fyri beinleiðis sambandi við viðskiftafólkini, samstundis sum tað gevur møguleikar at økja útflutningin til útheimin. Menningin av nethandli á heimasíðunum merkir eisini størri kapping. Fleiri eru um boðið enn áður og menningin innan Internetið ger, at fyritøkurnar hava møguleika at náa fleiri kundum skótari.

Leitingin á Internetinum er ofta vøruorientera. Kotuorðið aftanfyri gott úrslit á Internetinum er tí leitimaskinan.

» Tá tú leitar á netinum er ikki av týdningi, hvussu stór fyritøkan er, hvussu stórur umsetningurin er, ella hvør mann er. Kundin er tann ið leitar fyritøkur og vørurnar fram, tí er av stórum týdningi hvørjum og hvussu nógvum leitimaskinum ein er skrásettur í. Talið av leitimaskinum er avgerandi fyri søluna hjá fyritøkuni,« sigur Finn Jørgensen stjóri á fyritøkuni DINO A/S, sum hevur góðar royndir av sølu á Internetinum. Teir hava fingið kundar bæði í India og Egyptalandi orsaka av Internethandli.

»Heimasiðan og Webstoren hava verið við til at styrkja okkara samband við kundarnar. Upplýsing um nýggjheitir og onnur tiltøk náa skjótari út til kundarnar enn áður og tað er sjálvsagt ein styrki,« sigur Finn Jørgensen víðari.

Opið hús
hjá
Kaj Andreasen & Co

Nú farið er inní eitt nýtt áratúsund, er tíðin komin til framvísing av nýggjari vøru. Í samband við vitjan frá Hünnebeck frá 2. til 8. apríl, verður opið hús, har møguleiki verður at síggja:

- *Bosta stillads*
- *Opal Alu. stillads*
- *Rasto forskalling*
- *Tekko forskalling*
- *umframt annað*

Væntandi verður eisini møguleiki fyri at síggja eina 40" innrættaða bingju við Bosta - stillads klár til flutning frá byggiplássi til byggipláss.

Komið tískil til

Opið hús 6. apríl 2000

kl. 13.00 – 19.00 hjá
Kaj Andreasen & Co á Sandvíkarhjalla.
Okkurt verður til matna.

Brian Nissen frá Hünnebeck Danmark er at hitta frá 2. til 8. apríl á Hotel Hafnia,

tlf. 313233 ella á biltelefon nr. +45 40567547

Vit síggjast

Kaj Andreasen & Co
Hünnebeck Danmark A/S